gult cyan magenta svart



# PhD námsstyrkir á Náttúruvísinda-deildini

Søkt verður eftir fólki til tvær PhD-verkætlanir á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum. Verkætlanirnar eru fíggjaðar av oljufeløgunum Statoil-bólkinum, ið er samansettur av Statoil, Phillips, Enterprise og Veba. Ein lýsing av verkætlanum er at finna niðanfyri.

Umsøkjarar til phd námsstyrkirnar skulu hava prógv sum cand. scient. (t.d. jarðalisfrøði, støddfrøði) ella sivilverkfrøðingur (t.d. ravmagn, kolvetni). Tó eru tey, ið eru ávegis at gera kandidatuppgávu, eisini vælkomin at søkja.

---

**Seismisk signalviðgerðar hættir og modellering av multiblum afturkastingum í basalti og legugrýti**

Føroyska jarðfrøðin er merkt av, at tjúkk basaltløg eru oman á jarðløgunum, ið kunnu innihalda olju og gass. Phd-verkætlanin skal geva betur fatan av seismiskum mátingum og av viðgerðini av seismiskum signalum, serliga við atliti at føroyska økinum. Ein týðandi partur av verkætlanini er at kanna útbreiðsluna av seismiskum aldum í lagdeildum basalti og at kanna trupulleikarnar um at fáa vitan um legugrýti undir basaltløgunum út frá seismiskum mátingum. Serligt atlit verður til »multiblar« afturkastingar av seismiskum aldum í lagdeildum basalti, og til at trýstaldur verða gjørdar um til »shear«-aldur.

Meir fæst at vita um verkætlanina við at venda sær til Magnus Danielsen, professara, á teldupostadressu magnusd@nvd.fo ella á tel. 315306 hjá Náttúruvísindadeildini.

---

**Mekaniskir eginleikar hjá basalti**

Tjúkku basaltløgini oman á legugrýtinum í føroyska økinum eru ein serlig avbjóðing, ikki bert tá tulkingar av seismiskum royndum skulu gerast, men eisini í samband við sjálva boringina eftir olju og gassi í undirgrundini. Í hesi verkætlanini verða gjørdar kanningar av viðurskiftum, ið hava týdning fyri hvussu skjót boringin kann vera, og av týdninginum av, at rivur eru í basaltinum. Dentur verður lagdur á at analysera mekaniskar spenningar og elastiskar eginleikar við atliti at basalti í føroyska økinum, m.a. við starvstovukanningum og modellum. Kanningar verða eisini gjørdar av anisotropi, heterogeniteti og av viðurskiftum, ið hava týdning fyri at fáa seismisk signal gjøgnum basaltið.

Meir fæst at vita um verkætlanina við at venda sær til Bernt S. Aadnøy, professara, á teldupostadressu bernt.aadnoy@tn.his.no ella á tel. + 51831700 á Høgskolen i Stavanger í Noregi.

---

Umsóknarfreistin fyri báðar verkætlanirnar er til 1. mars 2001. Umsóknir við prógvum, ævisøgu (curriculum vitae) og møguligum greinum skulu sendast til

**Fróðskaparsetur Føroya,**
J. C. Svabosgøta 14,

**Barnasjónleikarfelagið Dramaverkstaðið**
Hallarheygur 2, FO 100 Tórshavn

# Fremmanda gentan



**Sýningar verða:**
Leygardagin 3. februar kl. 18.00
Sunnudagin 4. februar kl. 16.00
Sunnudagin 4. februar kl. 18.00

**Atgongumerkir:**
Atgongumerkir á 25 kr. kunnu keypast í forsølu
í Kunningarstovuni og
á Dramaverkstaðnum hálvan tíma undan sýning.
Børn undir 5 ár skulu vera saman við vaksnum.

# Bókhald

Føroya Shell søkir starvsfólk til bókhaldið á høvuðsskrivstovuni í Tórshavn.

Arbeiðið fevnir um:
- ábyrgd av ognara- og skuldarabókhaldinum
- vera við til at gera mánaðarroknskapir v.m.
- avgreiðslu av viðskiftafólki
- annað fyrisitingararbeiði

Vit vænta at tú:
- hevur HA, HH ella líknandi útbúgving
- hevur royndir innan bókhald og skrivstovuyrkið
- er hollur teldubrúkari
- hevur innlit í roknskaparlig viðurskifti

Vit kunnu bjóða:
- eitt fjølbroytt og sjálvstøðugt starv við avbjóðingum
- møguleikar fyri útbúgving og persónligari menning
- góða løn við eftirlønarskipan í samsvar við útbúgving og royndir.

Hevur tú hug at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at ringja á telefon 34 74 00 lokal 213. Fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

Umsókn við prógvum og viðmælum, merkt »bókhald« skal sendast til P/F Føroya Shell, Postboks 188, 110 Tórshavn, og má vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 19. februar 2001.

**Shell**

**Internet Sosialurin**
**www.sosialurin.fo**

LANDSVERKFRØÐINGURIN

# Verkfrøðingur

Starvið sum leiðari av maskindeildini hjá stovninum er leyst at søkja.

Maskindeildin hevur um hendi maskinamboð, skerv- og asfaltútbúnað, akfør o.a. hjá stovninum, umframt viðlíkahald av asfaltgoymsluni í Hósvík. Amboðini eru í nýtslu kring landið - mest í sambandi við gerð og hald av landsvegum. Maskinmiðstøð er í Kollafirði og annars smiðja á Lambareiði, í Øravík og Hvannasundi. Eini 25 fólk tilsamans eru knýtt til hetta virksemið. Smiðjumeistarar hava dagliga raksturin um hendi.

**Arbeiðsuppgávur**
Verkfrøðingurin hevur samskipanina av smiðjunum um hendi og hevur ábyrgdina av hesum virksemi.

Í høvuðsheitum er uppgávan hjá deildini rakstur av smiðjunum, viðlíkahald av maskinamboðum og útbúnaði, eykalutagoymsla, innkeyp av amboðum, eykalutum o. øðr.

Fasta tilhaldið verður maskinmiðstøðin í Kollafirði.

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir maskinverkfrøðingi og helst við royndum innan nevnda virkisøkið.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars vera sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og Verkfrøðingafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og møguligum ummælum verða at senda Landsverkfrøðinginum, Postboks 78, 110 Tórshavn og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 15. februar 2001. Merkið brævbjálvan »Maskinverkfrøðingur«.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Óla

**Urtagarðsarbeiði**

Vit gera alt urtagarðsarbeiði.

**Fa. Urtagarðsrøkt**
**v/Mass Jensen, Nólsoy**
Tlf. 32 71 31 – 28 39 53

**Málaraarbeiði**

Eg átaki mær alt innandura málaraarbeiði.

**Uni Nielsen, málari**
Tlf. 222103 · 318274

**Bátur til sølu**

Føroyskt bygt 7 mannafar í góðum standi, bygdur í 1986, 29 hestakreftir, Ruggini 29 Diesel.

**Tlf. 444846**



KIA
**CARNIVAL**
**2.9 Dohc Turbo-Diesel**
**16 V, 126 HK, 5 hurðar**
Sosialurin - 311820



**Rætti bilurin til mong endamál.**
**Pláss fyri 7 fólkum**
**og hópin av viðføri.**
**D. B. Bilar**
**Tel. 310 600**

**Ekspeditrisa**

søkist til skiftandi vaktir.

BAKARÍIÐ
P/F HJÁ GUNLEIVI
Postboks 3352 ·110 Tórshavn ·Tlf. 312161

i
Sosialurin



Hendir okkurt, sum
er áhugvert hjá øðrum at vita,
eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.

Sosialurin leggur seg eftir at bera
tíðindi úr øllum landinum.

Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota
bilinum við eyðkendu frámerkjunum.

Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið.
Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20.
Telefax nr. 31 47 20.

Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi
blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr.
42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07.
Eisini ber til at senda teldupost til:

edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo

Tíðindablaðið
sosialurin



**Skíferð**
10 - 18 mars 2001

10.mars 2001 skipar MB-Tours fyri
skíferð við flogfari til Avoriaz í Fraklandi.
Komi verður aftur til Føroyar
18.mars.

Kostnaðurin er einans

**7295,-**

Skíðir og liftkort er
íroknað prísinum.

**Tilmeldingarfreistin er**
**15.mars 2001**

MB-Tours
Bryggjubakki 2 · P.O. Box 3021 · FO-110 Tórshavn
Tel +298 32 21 21 · Fax +298 31 44 53
mb-tours@mb-tours.com · www.mb-tours.com
www.reproz.com



*Tú skuldi skift!*

*Vit skapa kappingina,*
*tú fært ágóðan!*

TeleF

*TeleF hevur lægstu telefonprísir í Føroyum. Okkara prísir verðaí februar og mars 20 oyru um minuttin - nátt sum dag. Hjá kappingarneytunum rindar tú upp í 90 % meira fyri minuttin.*

WWW. REPROZ.COM